

# Oljuvinnan stóran áhuga sum arbeiðspláss

**Jan Müller**

18.05.2014 - 17:59

Oljan.fo

Tey, sum lesa verkfrøði og búskap á teimum lærdu háskúlunum í Noregi, droyma í rættiliga stóran mun um at fáa arbeiði í teirri privatu vinnuni.

Tað vísir kanningin Karriérebarometeret, sum nú er gjørd triðja árið á rað av framtíðarætlanini hjá norskum studentum, og sum Aftenposten hevur hugt at.

Ovast á ynskilistanum hjá teimum verkfrøðilesandi eru privatir arbeiðsgevarar sum Statoil, SINTEF og Aker Solutions, og hjá teimum, sum lesa búskap, standa Statoil, Aker Solutions og Orkla ovast.

-Tað, sum telur mest hjá studentunum, er ein vinnugrein, sum er høgt í metum, og fyritøkur, sum geva starvsfólkinum møguleika at brúka síni evni, soleiðis at tey kunnu taka

seg fram í fyritøkuni. Harafturat telur umdømið hjá arbeiðsgevaranum, sigur Arve Kvalsvik, ráðgevi hjá felagnum Evidente, sum hevur gjørt kanningina saman við KarriereStart.

Sjálvur heldur hann, at tey lesandi uppfata tey almennu feløgini sum keðilig. Tann einasti almenni arbeiðsgevarin, sum er ovarlaga á ynskilistanum hjá studentunum, er Innovasjon Norge